Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



# Um tað tók sína tíð



*Formaðurin í SÍ. Jákup á Stongum, var bæði fegin og rørdur hetta kvøldið*

**Hvat um tað, um tað tók sína tíð? sungu sørvingar leygarkvøldið, tá teir á sjálvari hundrað ára føðingardagsveitsluni hjá SÍ eisini hátíðarhildu, at flogbóltsliðið hevði vunnið sítt fyrsta meistaraheiti**

HÁTÍÐARHALD

*Orð og myndir:*
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Eitt rimmar ball við dansi til tann ljósa morgun. Tað var tað, sørvingar góvu sínum ítróttarfelag og sær sjálvum í hundrað ára føðingardagsgávu. Eisini varð ein snotulig bók um søguna hjá SÍ hesi hundrað árini givin út til føðingardagin.

Skipað varð fyri hátíðarveitslu í fimleikarhøllini í skúlanum leygarkvøldið. Út móti 400 sørvingum burturi og heima hvødu leitað sær í høllina hetta kvøldið saman við innbodnum gestum.

Nógvar røður vórðu hildnar, og felagið fekk nógvar gávur hetta kvøldið. Røðaralistin umfataði landsstýrismannin við mentamálum, borgarstjóran í Sørvági, ÍSF forsetan, umboð fyri Fótbóltssamband Føroya, Sandavágs Ítróttarfelag, Sørvágs Arbeiðsmannafelag, Atlantsflog og fleiri einstaklingar, sum nýttu høvið at heilsa felagnum.

Umframt sang røður og frálíkt undirhald av pallinum, fingu flogbóltsmeistararnir hjá SÍ síni heiðursmerki og steyp handað frá formanninum fyri Flogbóltssambandi Føroya. Hesa avgerðina hjá Flogbóltssambandinum dámdi veitslufólkinum væl.

Sum serligur partur av undirhaldinum vórðu eldri videoupptøkur, sum Reðin Leonsson hevur gjørt av ymsum hendingum, sum viðkoma SÍ, vístar. Slíkt, sum vakti minni hjá mongum veitsluluttakara.

Eftir borðhaldið í fimleikarhøllini í skúlanum, varð farið oman í dansistovuna, har Sørvágsbólkurin Tinganest spældi til dans til tann ljósa morgun .



*Reðin Leonsson letur ikki eitt slíkt høvið fara óupptikið framvið videotólinum*



*Meistaraliðið í flogbólti fekk síni heiðursmerki og steyp handað frá formanninum í Flogbóltssambandinum á jubileumsveitsluni*